# Julian á triðja plássi

**Sannførandi gongdin seinastu vikurnar hjá Akranesi helt fram leygardagin, tá ið teir á heimavølli vunnu á Vali, sum misnýtti tvey brotsspørk**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Tað hevur gingið strúkandi hjá Akranesi seinastu vikurnar, og leygardagin vunnu teir aftur trý stig. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Vali, sum er aftast, og ÍA vann 2–0. Teir fingu bæði málini í 1. hálvleiki. Julian Johnsson, sum eftir landsdystin ímóti fyri tað mesta íslendskum útisetum var aftur á heimavøllinum, arbeiddi sum hann plagar, men hann eigur framvegis til góða at skjóta mál. Hesa ferð vóru ÍA málskjúttarnir Kristian Gade Jørgense, ið – sum navnið boðar frá – er úr Danmark, og so Hjálmur Dór Hjálmsson.

Mest merkisverda á Akranesi seinnapartin leygardagin var, at Valur misnýtti tvey brotsspørk. Í báðum førunum bjargaði ÍA málverjin, Þórður Þórðarson.

Meistaraliðið KR úr Reykjavík legði seg sunnudagin av álvara á odda í landskappingini. Í Reykjavík var toppdystur millum KR og Fylkir, sum higartil hevur verið undir liðini á KR. Meistararnir vunnu sannførandi 4–0, og nú eru teir fýra stig frammanfyri Fylkir.

Við sigrinum á Vali leygardagin lyfti ÍA, sum leingi lá niður ímóti niðurflytingarstrikuni, seg upp á bronsuplássið. Í gjárkvøldið skuldu FH og ÍBV spæla á Hafnafirði. Um tað eydnaðist heimaliðnum at vinna á eyjamonnum, so komu teir á triðja plássið.

Grindavík vann 3–2 á útivølli ímóti Þrótti, og KA tapti á heimavøllinum á Akureyri 1–0 ímóti Fram. Tapið hjá teimum á Akureyri kom sera illa við. Talan var um so at siga seks stiga uppgerð. Nú hava bæði KA og Fram seytjan stig og eru bara eitt stig undan Vali, ið er aftast.

Møguleikarnir hjá ÍA at vinna meistaraskapin mugu metast at vera lítlir og eingir. Vánaliga byrjanin upp á kappingarárið ger, at teir eru ov langt frá KR at røkka teimum í átjan umførum. Næsta avbjóðingin hjá ÍA verður mánakvøldið í næstu viku, tá ið teir skulu spæla á útivølli ímóti Fylkir. Um tað eydnast Juliani Johnsson og liðfeløgunum at fáa øll stigini, so verða teir undir liðini á Fylkir.

ÍA á Akranesi er annars tað felagið, sum hevur verið íslandsmeistari oftast. Teir hava verið meistarar átjan ferðir. Besta tíðarskeiðið hjá teimum var miðskeiðis í nítiárunum, tá ið teir vunnu fimm meistaraheiti upp í slag. Tað fyrsta vunnu teir í 1992, og tað síðsta í 1996.

# Jákup bíðar eftir fyrsta sigrinum

**Ímóti Celtic var einki at gera hjá Partick Thistle, sum kortini megnaði at varðveita spenningin allar 90 minuttirnar**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*

Eitt sindur spennandi var tað at finna út av, um Jákup Mikkelsen mundi fara at varðveita sessin millum stólparnar í Partick Thistle málinum, eftir at hann frá sunnudegnum og til hósdagin hevði verið burtur frá venjing í felagnum, tí hann hevði verið í Føroyum í landsliðsørindum.

Jákup var í málinum, tá ið stóra Celtic vitjaði ein av lítlubeiggjunum í Glasgow. Eftir áta minuttir legði Celtic seg á odda. Málskjútti var Paul Lambert, sum áður hevur spælt landsdystir fyri Skotland ímóti Føroyum. Í onkrum av skotsku fjølmiðlunum verður hildið, at Jákup Mikkelsen kundi havt bjargað skotinum, meðan tað aðra staðni verður mett meiri ivasamt. Leygarkvøldið vísti Sky news fleiri ferðir støðuna. Celtic spældi seg til baklinjuna í høgru og eitt sindur inni í brotsteiginum. Bólturin varð spældur flatt aftur til Paul Lambert, sum úr tólv metrum og við nógvum fólki millum seg og málverjan smekkaði til. Jákup tveitti seg sum ein køttur, og hann tóktist hava fatur á bóltinum, sum kortini datt inn um strikuna.

James Grady javnaði fyri Partick Thistle í 26. minutti, og ein minutt undan hvíldini skoraði Alan Thompson sigursmálið upp á brotsspark, sum fleiri skotskir fjølmiðlar halda var í so bíligt.

9.045 áskoðarar hugdu at, og teir sóu Jákup Mikkelsen fleiri ferðir verja væl fyri Celtic royndum. Celtic royndi seg fleiri ferðir við rúkandi langskotum av brotsteigarmarkinum, men Jákup stóð á rætta staðnum, og serliga var tað, tá ið innskifti Liam Miller royndi seg, at bjargingin var góð. Besta bjargingin var kanska tann í 7. minutti, tá ið Shaun Maloney varð einsamallur við Partick málverjanum, sum vann tvídystin teirra millum.

Gerry Collins, venjarin hjá Partick Thistle, er opinskáraður, og hann fjalir ikki yvir, um hann heldur ein av sínum monnum hava staðið fyri vánaligum avriki. Eftir uppgerðina ímóti Celtic var hann ikki heilt misnøgdur. Okkum er ikki komið fyri oyru, at hann hevur sagt nakað um, at hann ætlar at gera hóttanina at skifta málverja til veruleika. Í síðstu viku segði venjarin, at Jákup skuldi støðugt vísa sítt ítarsta, um hin málverjin ikki skuldi sleppa framat aftur.

Jákup og teir eiga eftir trý tey fyrstu umførini framvegis fyrsta sigurin á. Venjarin segði í leikskránni leygardagin, at burtursæð frá Celtic og Rangers og kanska Hearts so hevur liðið hjá honum bestu manningina í bestu deildini í Skotlandi. Higartil hevur tað ikki roynst væl. Aberdeen og Dundee United hava einki stig fingið og eru aftast. Partick er við einum stigi triði aftast.

Fremst í Skotlandi eru, sum tey plaga at vera, Rangers og Celtic, sum bæði hava fult stigatal, ið er níggju.

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 11 | 6 | 5 | 11 |
| 2 Brøndby (S) | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 10 |
| 3 FCM | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 10 | 7 | 3 | 10 |
| 4 FCK (M) | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 6 | 2 | 10 |
| 5 Frem | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 5 | 5 | 0 | 9 |
| 6 OB (S) | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 7 | 6 | 1 | 7 |
| 7 Viborg | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 8 FC Nordsj. | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 7 | 8 | -1 | 5 |
| 9 AaB | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 10 AGF | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 11 AB | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 4 |
| 12 Herfølge | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 2 | 7 | -5 | 3 |

**Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)**

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 10 | 1 | 9 | 12 |
| 2 Ølstykke | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 13 | 8 | 5 | 12 |
| 3 Køge | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 9 |
| 4 HFK Sønderj. | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 9 |
| 5 Fredericia | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 7 |
| 6 Randers FC | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 9 | 8 | 1 | 7 |
| 7 Fremad Amager | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 7 |
| 8 Vejle | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 5 | 7 | -2 | 7 |
| 9 Silkeborg | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 10 FC Nordjylland | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 5 | 6 | -1 | 6 |
| 11 Skjold | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 12 Nykøbing | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 6 | 8 | -2 | 3 |
| 13 B 93 | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 3 |
| 14 B 1913 | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 2 | 12 | -10 | 1 |
| 15 FC Aarhus | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 3 | 11 | -8 | 0 |
| 16 Brønshøj | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 2 | 11 | -9 | 0 |

**Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre)**

**Skotska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rangers | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 12 | 4 | 8 | 9 |
| 2 Celtic | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 7 |
| 3 Dunfermline | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 7 |
| 4 Hearts | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 1 | 4 | 6 |
| 5 Dundee | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 6 Hibernian | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 6 | -1 | 6 |
| 7 Livingston | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 1 | 1 | 0 | 4 |
| 8 Motherwell | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 2 | 5 | -3 | 3 |
| 9 Kilmarnock | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 3 | 7 | -4 | 3 |
| 10 Partick | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 11 Aberdeen | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 3 | 7 | -4 | 0 |
| 12 Dundee Utd. | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 10 | -9 | 0 |

**Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)**

**Íslendska Landsbankadeildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KR | 15 | 9 | - | 3 | - | 3 | 25 | 17 | 8 | 30 |
| 2 Fylkir | 15 | 8 | - | 2 | - | 5 | 22 | 19 | 3 | 26 |
| 3 ÍA | 15 | 6 | - | 5 | - | 4 | 23 | 19 | 4 | 23 |
| 4 Þróttur | 14 | 7 | - | 0 | - | 7 | 24 | 21 | 3 | 21 |
| 5 FH | 14 | 6 | - | 3 | - | 5 | 24 | 22 | 2 | 21 |
| 6 ÍBV | 14 | 6 | - | 1 | - | 7 | 20 | 21 | -1 | 19 |
| 7 Grindavík | 14 | 6 | - | 1 | - | 7 | 18 | 23 | -5 | 19 |
| 8 KA | 15 | 5 | - | 2 | - | 8 | 24 | 23 | 1 | 17 |
| 9 Fram | 15 | 5 | - | 2 | - | 8 | 20 | 28 | -8 | 17 |
| 10 Valur | 15 | 5 | - | 1 | - | 9 | 18 | 25 | -7 | 16 |

**Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)**



# Gunnar vann landavegsúkklingina

**Gunnar Dahl-Olsen, sum á Oyggjaleikunum vann bronsu, staðfesti um vikuskiftið styrki sína á longu teinunum**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*


Gunnar Dahl Olsen sýndi seg aftur sum sterkasti súkklarin, tá súkklaðir vórðu 105 kilometrar um vikuskiftið

Leygardagin skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri FM í landavegsúkkling. Teinurin var teinurin frá keiini á Toftum, uppum Eiðisskarð, suður gjøgnum Sundalagið, eftir Oyggjarvegnum til Havnar.

Komnir til Havnar var koyrt oman eftir Oyggjarvegnum, eftir Ringvegnum, niðan eftir Sundsvegnum, eftir Vegnum Langa, eftir Hvítanesvegnum har málið var. Seinasta strekkið í Havnini skuldi koyrast tvær ferðir. Teinurin var uml. 105 km.

Unglingar koyrdu tó ein tein, ið er eitt sindur styttri. Munurin er, at hesir ikki koyrdu eftir Oyggjarvegnum, men koyra gjøgnum Kaldbakstunnilin til Havnar. Eisini hjá teimum var málið við Plantusøluna við Hvítanesvegin, og eisini teir koyra teinin Ringvegur, Sundsvegur, Vegurin Langi og Hvítanesvegur tvær ferðir. Teinurin er umleið 90 km.

Eins og til FM kappingina í einkultstarti síðsta leygardag, var undirtøkan rættiliga góð. Hjá teimum vaksnu vóru 10 luttakarar, harav 8 gjøgnumførdu. Guðmund Joensen og Gutti Harryson vóru við fyri fyrstu ferð. Teir høvdu avtalað at fylgjast og komu báður á mál sum nr. 7.

Hjá unglingunum vóru tríggir luttakarar, harav tveir komu á mál. Hans Krossstein fekk trupuleikar av einum gomlum skaða, og var noyddur at gevast! Allir fylgdust nøkunlunda av Toftum til Eiðisskarð. Men í brekkuni niðan á Eiðisskarð bleiv felti meiri spjatt, og til Havnar koyrdu teir flestu einsamallir.

Komandi leygardag er tað býarkoyringin, sum stendur á skránni. Hetta fer fram uppi á Hálsi í Havn, og tá verður eisini møguleiki hjá yngru súkklarnum at kappast.

# KÍ kvinnurnar snýttar

**Mest sum einsamallur álopsspælari hjá moldoviska meistaraliðnum gjørdi fýra mál og harvið tapti KÍ 5–3 og tískil allar dystirnar í Hollandi**

EUROPA CUP KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Í gjár skuldu KÍ kvinnurnar koma aftur til Klaksvíkar eftir Europa Cup luttøkuna á hesum sinni. At tær næstu vikurnar fara at vinna atgongumerki til kappingina næsta ár er einki at ivast í. Tað er neyvan nakar spurningur, um tær ætla at gera eina roynd afturat. At tað ikki eydnaðist at fáa nakað stig burturúr ferðini til Hollands hevur ivaleyst við sær, at tær fara at gera nýggja roynd. Spurningurin er heldur, um tað ikki nú hevði verið upp á sítt pláss, at undanumfarið varð spælt í Føroyum.

Síðsta uppgerðin í Hollandi var leygardagin ímóti FC Codru úr Moldava. Hetta liðið hevði eins og KÍ frammanundan tapt tveir dystir.

Í 1. hálvleiki sá væl út hjá KÍ. Hóast mótstøðuliðið legði seg á odda, tá ið tíggju minuttir vóru farnir, so hevði KÍ gott tak á. Í 29. minutti javnaði Rannvá B. Andreasen, eftir at Una Olsen hevði lagt innfyri úr høgru, og fimm minuttir seinni legði Rannvá B. Andreasen KÍ framum, eftir at hon hevði sneitt seg ígjøgnum verjuna. Tað sá heilt gott út hjá KÍ, tá ið Malena Josephsen tveir minuttir undan kærkomnu hvíldini tók bóltin av málverjanum, sum tøvdi, og tað so stóð 3–1 til KÍ.

Men eftir steðgin vendi alt skeiva vegin. Kanska vóru KÍ spælararnir ikki heilt so disiplineraðir í verjupartinum, sum tað aftaná kann sigast, at teir áttu at havt verið. Tað var ein orsøk til, at tær taptu 5–3. Hin orsøkin var, at mótstøðuliðið hevði ein spælara, sum var í flokki fyri seg. Hon var í álopinum, og hon skoraði fýra av teimum fimm málunum, sum FC Codru fekk.

Í 52. minutti minkaði hon um munin, eftir at hon hevði sneitt fleiri í KÍ verjuni av, í 64. minutti javnaði hon, og tíggju minuttir seinni var KÍ aftanfyri 5–3.

– Sjálvandi eru vit sera vónbrotin av, at tað í 2. hálvleiki ikki eydnaðist at varðveita trivaligu leiðsluna, sum vit fingu í 1. hálvleiki. Vit mugu bara ásanna, at tað var nóg mikið hjá mótstøðuliðnum at hava ein framúr góðan álopsspælara, segði Jón Harald Poulsen, sum øll árini, KÍ hevur verið í Europa Cup, hevur havt ábyrgdina av liðnum. Í ár er tað eins og í fjør saman við Ova Nysted.

Hetta var triðja árið á rað, at KÍ kvinnurnar hava luttikið í Europa Cup. Í fjør og í fyrraárið eydnaðist tað at røkka málinum, sum var at vinna í hvussu so er ein dyst.

## Úrslit, FM í landavegskoyring

**Vaksin**

| | |
|---|---|
| 1 Gunnar Dahl-Olsen | 3t 17.min 42sek |
| 2 Eli J. Christiansen | 3t 42.min 34sek |
| 3 Sverri Mohr-Edvinson | 3t 42.min 35sek |
| 4 Palle Melchiorsen | 4t 04.min 09sek |
| 5 Christian Guttesen | 4t 05.min 54sek |
| 6 Kári Simonsen | 4t 06.min 59sek |
| 7 Guðmund Joensen | 4t 12.min 26sek |
| 7 Gutti Harryson | 4t 12.min 26sek |

**Útgingin**
Jón Ellingsgaard
Evald Rasmussen

**Unglingar**

| | |
|---|---|
| Bergur Johansen | 3t 28.min 05sek |
| Dánjal Michalsen | 3t 42.min 46sek |

**Útgingin**
Hans Krosstein